# Virkið virki síðani 1932

**Í 1932 fór Palle Mortensen av Argjum og til Vágs at arbeiða. Tvey ár seinni setti hann á stovn egið virki og Tangavirkið hevur síðani verið virkið og í vøkstri**




Tangavirkið í Vági er gamalt og støðufast virkið. Fyritøkan er eisini kend sum Smiðjan hjá Bent, ella Smiðjan hjá Bentt hjá Argja Palla.

Og alt hetta hevur sín uppruna í, at Palle Mortensen fór av Argjum, og suður til Vágs at arbeiða uppá motorar hjá fyritøkuni Á Gørðunum. Har var hann í tvey ár, og Garðamenn vildu fegnir hava henda hegnismann at arbeiða fyri seg, men hann setti ístaðin egið virki á stovn. Hetta var í 1932.

Hetta vóru ringar tíðir, tríatiárini eru tiltikin trupul, og í byrjanini vóru tað vanligar umvælingar á skránni, sum sum á súkklur og á skip.

So gjørdust tíðirnar betri, og vanligar umvælingar vóru framvegis á skránni, og nógv virksemi var í Vági.

Fyrst í sekstiárunum gjørdist alt meira vanligt, at fólk fingu sær miðstøðuhita í húsini, og Smiðjan hjá Argja Palla gjørdi ketlar, og legði inn miðstøðuhita. Framleiðslan av ketlum helt fram til einaferð í seinnu helvt av sjeytiárunum, og fyritøkan hevur gjørt yvir 400 ketlar hesi árini.

## Skiftistíðir

Tangavirkið hevur lagað seg til skiftandi tíðir, men miðstøðuhitin er enn partur av virkseminum.

– Vit leggja inn í hús framvegis, og hava eisini størri verkætlanir, og hava t.d. júst staðið fyri arbeiðiðnum at leggja inn í Miðnámsskúlan í Hovi, sigur Mortan Mortensen, ið er 3. ættarlið av undangongumonnum í fyritøkuni.

Annars eru tað oljutangar, konstruktiónir og alskyns stálarbeiði, ið Tangavirkið fæst við. T.d. hevur fyritøkan gjørt stálarbeiðið til byggiarbeiðið á Hamrinum á Argjum, sum Valbjørn Dalsgarð stendur fyri, brandtrappur til Eysturskúlan í Havn, eitt arbeiði, sum Karstin Joensen stendur fyri, og Tangavirkið letur eisini nógv til CN-Bygg , m.a. trappur, altanir, stálsúlur og annað.

Fyritøkan er stutt sagt serkøn innan stálarbeiði.

## Handil

Fyri nøkrum árum síðani lat Tangavirkið eisini upp ein handil, ið er fastbygdur í smiðjubygningin. Talan er um HVS handil, ið hevur rímuliga breitt úrval.

Mortan Mortensen sigur, at enn hevur Tangavirkið nógv at gera. 15 mans arbeiða á Tangavirkinum í Vági.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
















